# Dani horvin úr báti



Ein 67 ára gamal dani, sum var á veg tvørtur um Atlantshavið við selgskipinum "Holo Ki Ki", er eftir øllum at døma dottin út og druknaður á leiðini við Bahamas. Tann 25. mai varnaðist ein fiskimaður seglskipið, og tá hann ikki dugdi at síggja nakað fólk umborð, boðaði hann myndugleikunum frá. Amerikanska sjóverjan fór at leita, men maðurin var ikki at finna. Havleiðin við Bahamas er tiltikin fyri tann nógva hávin, sum heldur til har.

# Finnur ikki Grønland

Tað ljóðar ikki sørt løgið, men sambært danska umhvørvismálaráðharranum, Troels Lund Poulsen, vita danskir myndugleikar ikki, hvar Grønland er. Frágreiðingin er, at tey grønlendsku sjókortini eru ikki nóg neyv og vísa als ikki veruleikan. Troels Lund Poulsen sigur við Berlingske Tidende, at onkunstaðni er strondin á kortinum heilar 30 kilometrar við síðuna av veruleikanum. Nú verða nýggj kort teknað við hjálp av GPS-skipanini.

# Adams og Helena sungu duett

**14. juli í fjør fekk føroyska Helena Jacobsen sítt lívs upplivilsi, tá hon mitt í einari Bryan Adams konsert sang duett við heimskenda kanadiumanninum**

KONSERT

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá Helena Jacobsen í fjør frætti, at Bryan Adams skuldi halda konsert á Malta júst um ta tíðina, tá hon skuldi verða á oynni í feriu, gjørdi hon skjótt av og keypti sær eitt sonevnt VIP-atgongumerki. Tað merkir í stuttum tað, at tú sleppur at standa fremst til konsertina.

- Hetta var ein stór konsert, eini 70.000 fólk. Seld vórðu eini 2000 VIP-atgongumerki, og tey kostaðu einar 600 krónur, sum vit føroyingar jú væl hava ráð til. Vanligu atgongumerkini kostaðu um 200 krónur sum er meiri hóskiligt fyri vanliga maltesaran, sigur Helena Jacobsen.

Tey gjørdu av at fara til konsertina í góðari tíð. Tað var ikki bara sum at siga tað at standa í bíðirøð í 45 gradum hita, so tey skiftust um at fara úr bíðirøðini at leska sær á.

- Tað vóu tveir pallar á konsertøkinum. Annar stóð mitt á økinum, og Bryan Adams byrjaði har. Hetta var helst fyri at tey, sum ikki høvdu VIP-atgongumerki, eisini skuldu hava ein møguleika at koma rímiliga nær hesi heimsstjørnuni, sigur Helena Jacobsen.

Bryan Adams sang einar tveir-tríggjar sangir á miðpallinum, og síðani flutti hann seg yvir á høvuðspallin – mitt gjøgnum mannamúgvuna, bert vardur av body-guardum.

- Eg hevði sett taskuna frá mær á eitt trapputrin, og hann kom beint framvið mær. Í tí hann kemur framvið, verði eg skumpað og eri um at detta. Tá tók hann í meg og hálaði meg upp aftur, og áðrenn eg visti av, stóðu vit og sungu duett saman, greiddi Helena Jacobsen frá á Rás2 í morgun.

## Tíðin hvarv

Sjálvsagt var alt ferðalagið hjá Helenu púra ovfarið av hesum, og táverandi sjeikurin og núverandi maður Helenu royndi til fánýtis at fáa myndir av teimum báðum, meðan tey sungu duett saman.

- Tað kendist, sum sungu vit saman í fimm sekund, men tað hevur verið væl longri, tí vit sungu tvey ørindi saman, sigur Helena Jacobsen, sum ikki minnist, hvør sangurin var, tey sungu saman.

- Eingin av okkum minnist sangir, men eg ørminnist nakað um, at tað var »Somebody«, sigur Helena Jacobsen.

Hon verður eisini upp á pláss til konsertina í kvøld, og hon ætlar sær eisini at standa fremst, men um hon enn einaferð sleppur at syngja duett saman við Bryan Adams, ivast hon eitt sindur í.

Hon sigur tó, at Bryan Adams er ein stórur performari, sum veruliga dugir at fáa áhoyrararnar við.

Hann tók eisini eina maltesiska gentu upp á pallin at syngja saman við sær, so tað kann verða, at onkur sleppur á pall við honum í kvøld.

- Ráðini í fjør vóru at fara í skríggjandi klæðir, tí tá skiltist mann burtur úr mongdini. Trupulleikin var bert tann, at tað høvdu øll gjørt og tað var bara ein genta, sum var í hvítum, og tað varð hon, sum bleiv rópt upp á pallin, sigur Helena Jacobsen.

Hon gleðir seg annars at uppliva Bryan Adams á palli aftur.

- Hann sang allar teir góðu, kendu sangirnir á konsertini á Malta í fjør, og tað rokni eg við, at hann eisini fer at gera í kvøld, segði Helena Jacobsen, sum altso ætlar sær at møta í góðari tíð í kvøld, við Rás2.



*Helena Jacobsen sang duett við Bryan Adams til eina konsert á Malta í fjør*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fyrilestur í Klaksvík um Tammerfors

**Hóskvøldið fer finski savnsleiðarin Toimi Jaatinen at halda fyrilestur í Býráðshøllini í Klaksvík við heitinum Tann Skapandi Tammerfors: Hvussu kunnu vinnan og mentan stuðla hvørjum øðrum?**

## Útbúgving og mentan

Fyrilesturin hjá Jaatinen tekur støði í nógva virkseminum í og kring Tammerfors.

Grøni og lívsfúsi Tammerfors verður mettur at verða millum fremstu kongressferðamanna og mentanarbýum í Norðurlondum. Eini 15000 fólk koma árliga á tær á leið 30 kongressirnar í Tammerfors.

Burtursæð frá Helsinki, er Tammerfors størsti lestrarbýur í Finlandi. Á teimum fimm fróðskaparsetrunum eru 34000 lesandi. Av teimum 300.000 íbúgvunum í økinum, hava 26,5 prosent eina universitetsútbúgving. Sostatt eigur Finland flest høgt útbúgvin fólk í Norðurlondum

Tammerfors er eisini ein av undangongubýunum innan gransking. Á granskingardeplinum í býnum hava tey millum annað serkunnað seg um heilsu- og biotøkni eins og innan kunning og samskifti.

Sum mentanarbýur er Tammerfors errin av sínum orkestri, Tammerfors filharmoniska orkestur, eins og av teimum rættiliga nógvu leikhúsunum og gripagoymslunum.

Fyrilesturin hjá Toimi Jaatinen verður at hoyra í býráðshøllini í Klaksvík hóskvøldið klokkan 19.30

**ave**



*Finski býurin, Tammerfors, er ein av undangongubýunum í Norðurlondum, tá tað ræður um útbúgving, gransking og mentan*